

14

– De dödar valarna

Miljövänner rasar mot slakten på Färöarna

De fångar fortfarande val – trots förbudet

15

för nöjes skull

Lika dyrt till Luleå som till New York

Öringen trivs som fisken i vattnet

EIA herferðin móti grindadrápi heldur fram:

Føroyingar drepa grind til stuttleika

Herferðin hjá umhvørvisfelagsskapinum, EIA, móti Føroyum og grindadrápi heldur fram. Felagsskapurin er kelda til bæði greinar og myndir í vaksandi tali av útlendskum bløðum og tíðarritum. Boðskapurin er, at føroyingar eru blóðtystir barbarar

Tað er ikki bert stóra týska vikublaðið "Das Neue", sum í hesum døgum fær sendandi myndir av grindadrápi, soleiðis sum vit greiddu frá í grein her í blaðnum týsdagin. Eisini onnur stór bløð í útlondum eru farin uppí herferðina móti grindadrápinum.

Og allastaðni ella í flestu førum stingur sama navnið og sami felagsskapurin seg upp. Talan er um sokallaða umhvørvisverndarfelagsskapin EIA, sum stendur fyri "Environmental and Investigation Agency".

Føroyingar hava serstøk minni um just henda felagsskapin. Tað var leiðarin í EIA, Poul Watson, sum fyri nøkrum árum síðani kom til Føroya við skipi sínum og royndi at forða føroyingum í at drepa grind.

Síðani hevur EIA brúkt nógvan pening og orku til eina heimsumfatandi herferð móti føroyska grindadrápinum.

Fólk frá felagsskapinum hava verið í Føroyum og

Framhald á síðu 7



Ætla ikki at lúta fyri grindaherferðini frá EIA ol.

Hittust í Havn at tosa um grindamál

Louis Wilson, føroyskur grindalobbyistur í London: -Tað er rætt av føroyingum aftur og aftur at vísa aftur misvísandi og villleiðand upplýsingunum, sum koma fram í útlandinum um grindadráp.

Nú um dagarnar var fundur í Havn um allan grindaspurningin. Hjástødd vóru nøkur av teimum fólkum, sum hava tilknýti til grindaspurningar.

Louis Wilson, sum stendur á odda fyri "Faroe Islands Solidarity Committee" í Bretlandi og sum har roynir at vísa aftur ósakligum og misvísandi upplýsingum um grindadráp, var við á fundinum. Harumframt vóru formaðurin í Grindaveiðumannafelagsskapinum, Hans Jákup Hermansen, Jústines Olsen, landsdjóralækni, Doretha Blokk, doktari og tvey umboð fyri landsstýrið, Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri og Anna Maria Fossá, fulltrúi.

Á fundinum nýttu tey høvi til at líta aftur um bak og viðgera teir ymsu spurningarnar, sum hava verið frammi um grindadráp seinastu tíðina.

Eisini løgdu Kjartan og Jústines fram tað, sum kom burtur úr á altjóða hvalaveiðufundinum í Dublin herfyri.

Tað var á hesum fundinum, at ein yvirlýsing varð gjørd, sum rósti føroyingum fyri stóra arbeiði í sambandi við grind, men heitt varð samtíðis á føroyingar um at síggja til, at dráps-hátturin verður betraður.

Louis Wilson, sum eisini greiddi frá sínum arbeiði í London sigur við Sosialin, at tað er av stórum týdningi, at føroyingar halda fram við at kunna umheimin um grindadráp og harvið vísa aftur teimum mongu skeivu og misvísandi upplýsingunum, sum koma fram í útlendskum fjølmiðlum. Hvat Bretlandi viðvíkur, so heldur hann, at slíkt arbeiði hevur havt ávirkan. Saklig upplýsing í bløðunum og tíðamhaldandi samband við eitt nú almennar myndugleikar um, hvat veruliga fer fram í Føroyum, hevur nógv at siga í longdini.

Louis Wilson verður annars oftani endurgivin í útlendskum bløðum, tá talan er um grindadráp. Nú um dagarnar hevði svenskt blað grein um grindadráp, og har hevur blaðfólkið eisini sett seg í samband við Louis Wilson.

-Tað kann fyri onkran sjálvandi tykjast sum at okkara arbeiði er bert ein dropi í havinum, men eg haldi tað er týdningarmikið, at føroyingar gera vart við seg og vísa aftur misvísandi og beinleiðis ósonnum upplýsingum frá eitt nú felgsskapum sum EIA.

Umframt Louis Wilson, so hjálpir eisini Marjun Joensen King, sum er uppvaksin í Lorvík, til í arbeiðinum. Tey hava so eini 200 kontaktfólk kring alt Bretland, sum javnan fáa tilfar sendandi.

Herfyri fingu tey sendandi nakrar av grindatekningunum hjá Óla Petersen í Sosialinum at brúka ímóti herðferðini hjá eitt nú EIA.

jan